# Bilar

Nr. 135 • hósdagur • 18. juli 2002 • 76. árg.

# Seat Ibiza – smart og sportligt design




*Øssur Johannesen, stjóri á Bilasøluni v.Øssur Johannesen, og Erik Blacha, stjóri í Skanco A/S, ið innflyta Seat bilar til Danmarkar, sýna her fram nýggja Seat Ibiza*

**Nýggjur Seat Ibiza er komin á marknaðin. Bilurin, ið hevur smart og spennandi design, fæst við bæði bensin og TDI dieselmotorum. Innan teknisku menningina er nýggi Ibiza ein sera framkomin bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Við tað at VW konserin nú eigur sponsku Seat verksmiðjuna, eru talan um VW bilar við sjálvstøðugum modellum og búmerkjum. Nýggi Ibiza er bygdur yvir sama plattform sum t.d. Skoda Fabia. Ibiza hevur sjálvstøðugt design, og samlikvaliteturin er heilt í topp. Framkomna undirvognsskipanin, saman við elektrohydraulisku servostýringini, gevur bilinum sportligar koyrieginleikar og eina sera stútta og beinleiðis stýring.

### Hópin av eykaútgerð

Ibiza fæst við tveimum bensinmotorum við ávikavist 64 og 75 hk. Diesel motorarnir eru eisini tveir í at velja, báðir eru 1,9 TDI við ávikavist 101 og 130 hk. Ibiza verður gjørdur í útgávum við 3 og 5 hurðum. Hvat komforti og útgerð viðvíkur eru hesar útgávurnar at velja í: Stella, Sport Signo. Bilurin kann leverast við hópin av eykaútgerð, so sum fartpiloti, klimaanleggi, leðursetrum (bert til Sport Plus), elsóltaki og Xenon lyktum.

## Salsa verður væntandi til Seat Leon í 2004



*Seat Salsa er ein smartur bilur. Um Seat Leon kemur at síggja soleiðis út, verður hann ein góð søluvøra*

**Konseptbilurin Seat Salsa, ið fyrstu ferð varð alment sýndur fram á Geneve Motorshow í 2000, verður væntandi til ein nýggjan Seat Leon um tvey ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Seat Salsa er enn ein konseptbilur, men nógv bendir á at avloysarin fyri Seat Leon, ið kemur á marknaðin í 2004, kemur at síggja nakað soleiðis út. Bilurin verður bygdur yvir sama plattform sum teir komandi Audi A3 og VW Golf. Konseptbilurin hevur ein 2.8 litur V6 motor við 250 hk og Tiptronic automatiskum girkassa. Tá bilurin kemur á marknaðin sum Seat Leon, verður tað eisini við 1,4 litur, 1,6 litur og 2,0 litur motorum.



*Innan er alt í sportligum stíli. Instrumentini líkjast teimum á VW, meðan instrumentborðið hevur sítt egna design*

SEAT

## Seat Ibiza 1,4 16V 3/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,4 litur 4 syl. bensin 75 hk |
| 0-100 km/t | 13,3 sek. |
| Bensinnýtsla | 15,4 km/l (blandað koyring) |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 395,3 cm |
| Breidd | 169,8 cm |
| Hædd | 144,1 cm |
| Eginvekt | 1075 kg |
| Prísur | kr. 148.000,- |
| Søluumboð: | Bilasølan v.Øssur Johannesen<br>Vegurin langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel.315354<br>www.audi-vw.net |

# LHG Group - framleiða og endurnýta SUVO rustverju



*Benny Pedersen er sølu og innkeypsstjóri hjá donsku fyritøkuni LHG Group A/S*

*SUVO búmerki*

**Sølu og innkeypsstjórin hjá donsku fyritøkuni, LHG Group A/S, ið eisini framleiða SUVO rustverju, kannar møguleikarnar fyri at einum SUVO rustviðgerðarstøð í Føroyum, ið hann heldur at tørvur er á**

RUSTVIÐGERÐ
*Magnus Gunnarsson*

LHG Group A/S er ein 30 ára gomul donsk fyritøka, ið sjálv framleiðir 300 tons av SUVO rustverju árliga til bilar og til ídnaðin. Umframt hesa framleiðsluna endurnýta teir 250 tons av rustverju árliga. Tað gongur fyri seg á tann hátt, at yvirskotsrustverjan, ið rennur burtur, tá ein bilur verður rustviðgjørdur, verður endurnýtt til eitt nú undirvognsviðgerð. Umframt at framleiða útgerð til bilvinnugreinina, framleiða teir eisini sproytuútgerð til ymiskar ídnaðargreinar. Til dømis at sproyta glasur uppá smákøkur, sproyting av printplátum og rustviðgerð av ymiskum sløgum. Í Danmark geva teir upp til 15 ára gjøgnumteringsgaranti uppá rustverju av nýggjum bilum.



*Her vísir Benny Pedersen hvussu SUVO rustverjan, ið teir sjálvir framleiða, skal brúkast*

## Mondeo við 42 volt



Delphi Corp. í USA og Ford Motor Co. samstarva um eina dupulta battarískipan, ið er ávikavist 12 og 42 volt. Skipanin verður í løtuni royndarkoyrd við nøkrum Ford Mondeo stationvognum í Týsklandi

*Kelda: Motor Magasinet*

## Volvo dukkur



Volvo Car Corporation hava gjørt heimsins fyrstu dukkur, ið eru við barn, til teirra krasj-testir. Endamálið við hesum dukkum er at kanna hvussu mamman og barnið reagera uppá airbag og trygdarbeltið í einum samanstoyti

*Kelda: Tíðindaskriv frá Volvo Personvogne Danmark A/S*

# Týska løgreglan ávarar ímóti ránsmonnum við rastiplássini

*Týska løgreglan hevur styrkt um eftirlitið við motorvegirnar og rastiplássini*




**Danska ríkisløgreglan er blivin ávarað av sínum týsku starvsfeløgum um vandan fyri ráni á rastiplássunum framvið týsku motorvegunum**

KOYRING UTTANLANDS
*Magnus Gunnarsson*

Síðan 1997 hava nógvir bilførarar og onnur ferðandi verði atsøkt av ránsmonnum, ið hava tikið teirra ognarlutir, meðan bilarnir hava staði á týsku rastiplássunum. Hetta er galdandi fyri øll sløg av bilum, frá persónbilum til campingbilar. Ránsmennirnir, ið fyri tað mesta koma úr Suðurevropa, gera mest um seg um næturnar, tá teir bróta inn í bilarnar og stjala pening, kreditkort, fartelefonir og aðrar virðislutir. Týska løgreglan hevur styrkt um eftirlitið við motorvegirnar og rastiplássini. Tað sum bilførarar og tey ferðandi skulu ansa eftir, er, at læsa bilin og minnast til at allir rútarnir eru afturlatnir, at goyma virðislutirnar ella hava teir hjá sær. Eisini ber til at seta alarmskipan í bilin. Set altíð bilin á væl upplýst støð á parkeringsøkinum. Tey, sum koma út fyri at herverk er framt móti teimum, skulu siga frá á alarmtelefonini hjá týsku løgregluni.

## Toyota og Honda



Tær seinastu J.& D. Power rapportirnar, ið geva bilverksmiðjunum á nógvum ymiskum marknaðum kvalitetskarakter, upplýsa, at kvaliteturin í bilídnaðinum er betraður við umleið 10 prosentum seinasta árið. Bestir í teirra kanningum hesaferð vórðu Toyota og Honda

*Kelda: Motor Magasinet*